**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Hans Pauli Joensen (HPJ), Janus Jensen og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 17. februar 2015 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Kunning um størv**
   NVD: 8 umsóknir komu til starvið heilsuvísindi. Nógvar umsóknir eru komnar til starvið mýlalívfrøði. Lýsingin til KT-verkfrøði er klár at lýsa aftur.

   FMD: Starvið hjá Eyðun Andreassen er endurlýst. Eingin umsókn er komin enn.

   Arbeitt verður við at styrkja sambandi millum undirvísarar á NVD og NÀD innan náttúruvísindaligu fakini á Námsvísindadeildini. Vit mugu fáa eitt samstarv í lag hóast tað er trupult at viðgera fak-fak mótvegis didaktiska grundstøðið á NÁD.

   Avgerð tikin um at kalla undirvísarnir inn fyri at viðgera málið.

   Jóni fer úr starvi pr. 1 apríl. Starvið skal lýsast leyst skjótast gjørligt.

   Videofundur hevur eydnast sera væl, skipanin er løtt at brúka, og lesandi í Klaksvík og Runavík hava tikið væl ímóti skipanini. Ynski er um at fáa eitt aftrat á NÁD.

   Setrið hevur verið í einum ávísum samskifti við Tórshavnar Musikkskúla. Ætlanin er at seta ein arbeiðsbólk at útgreina møguleikarnar fyri einum útbúgvingarsamstarvi.

   **Vegleiðaraútbúgvingin**
   Fleiri av studentunum fara í starvslæru á stovnum í næstum. Setrið hevur sent MMR eina áheitan um at fáa fígging til næsta árið, men Setrið hevur ikki fingið svar enn. Setrið rykti eftir svari á fundi við Mentamálaráðið fríggjadagin 13. februar. Rektarin fer á skypefund við Siv seinni í dag.

/JM